


# Kirkjukórið Ljómur keypt hús

**Kirkjukórið Ljómur hevur fyri stuttum keypt sethúsini vestanfyri Vágs kirkju. I hesum sambandið verður skipað fyri reseptión, kafé, listaframsýning, sang- og hugnaløtu í Ljómhúsinum á jóansøku**

KÓRHÚS
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Ætlanin hjá kórinum er, at húsið skal vera aktivur savningarstaður og karmur um kór-, tónleika- og mentanarlív í Vági og í Suðuroynni.

Tórskvøldið 22. juni kl.20 hevur Jóannes Nolsøe orgulkonsert í Vágs kirkju.

**Reseptión aftaná**

Aftaná konsertina verður Reseptión í Ljómhúsinum, har øll áhugað hava høvi at støkka inn á gólvið í samband við, at húsið alment verður tikið í nýtslu.

Annars hendir ein hópur í húsinum um jóansøkuna. Kafé og listaframsýning verður seinrapartarnar og sang- og hugnaløtur um kvøldarnar kl. 19-21, sigur kórið í tíðindaskrivi.

## Ongin noyðist at ganga svangur á Jóansøkufestivalinum

Sjálvur tónleikur er ein avgerandi partur av tí at fara á festival, men matur og drekka og gott lag annars, hava eisini stóran týdning fyri hvussu ein festivalur eydnast – fyri hvussu gestir hava tað á festivalinum. – Og har er greitt, at ongin noyðist at ganga svangur á Jóansøkufestivalinum. Í samstarvi við VB og VB/ Sumba verða borðreitt við framúr góðum mati á Jóansøkufestivalinum. Á menu'ini er m.a. grillaðir búffar við eplabátum, salat og sós, grillspjót við tilhoyri, ymisk sløg av góðum smyrjibreyði, góð víkingasuppa, grýturættur, og so framvegis. Tostan kann man sløkkja við kaffi, te, sodavatni ella Svali – ella við góðum íslendskum øli frá Vífilfell ella føroyskum kvalitets øli frá Restorffs. Karmarnir eru til staðar- og tað er tað góða!

## Ein dags pass til festivalin

**Nú í Jóansøkuvikuni og sjálvar festivaldagarnar verður tað gjørligt at keypa 1 dags pass til Jóansøkufestivalin**

Tað vil siga keypa atgongupass til fríggjadagin og atgongupass til leygardagin. Hesi pass geva so bert atgongd til 1 dag. Fríggjadagspassini kosta 350,- kr. og tað gera leygardagspassini eisini. 1 dags passini fáast í Jóansøkuvikuni til keyps á Kunningarstovuni í Vági, umframt at tey eisini fáast til keyps við inngongdina á Jóansøkufestivalinum.

## Umbýtið til armbond

Eins og á Jóansøkufestivalinum í fjør, so skulu pappírs atgongumerkini býtast um við armbond áðrenn farið verður á Jóansøkufestivalin. Tú kann býta um títt atgongumerki við armband á Kunningarstovuni í Vági og á Kunningarstovuni á Tvøroyri alla Jóansøkuvikuna. Harumframt kanst tú býta um armbond við inngongdina á Jóansøkufestivalin.




